# Byggja skúlan út fyri fleiri milliónir

**Tá ið skúlin verður liðugur, verður hann tvær ferðir so stórur, sum hann er nú**

ÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*



*Hesi bæði næstu árini skal skúlin í Sumba bæði umvælast og byggjast út við fleiri serstovum*

**Sumba:** Í Sumba verða nú so stórar ábøtur gjørdar á skúlan í bygdini, at hann verður ikki at kenna aftur.

Í fyrra lagi er ætlanin at høvuðsumvæla skúlabygningin, sum er. Í øðrum lagi verður skúlin útbygdur so at hann verður tvær ferðir so stórur, sum hann er nú.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumbiar Kommunu, sigur, at Mentamálaráðið hevur góðkent ætlanina og farið verður nú undir at projektera arbeiða. So verður arbeiðið boðið út í heyst og síðani verður beinanvegin farið at byggja

Hann sigur, at Arbeiðið verður liðugt á vári í 2004. Arbeiðið verður gjørt, bæði tí at skúlin,sum er, trongir til ábøtur og tí at nýggja fólkaskúlalógin setir heilt onnur krøv til skúlabygningar, enn áður við, serstovum og øðrum og tað er hetta, sum uppíbyggingin umfatar.

Hann vil ikki siga, hvussu nógv arbeiðið kostar, men talan er um milliónir.

Nakað er sett av á fíggjarætlanini hjá kommununi í ár til endamálið, men ætlanin er at seta pening av, bæði í 2003 og 2004 til endamálið.

## Øll fíggjarmegin

Borgarstjórin sigur, at ætlanin er ikki at taka lán til arbeiðið, so hesi næstu árini fer skúlin við allari fíggjarmegi hjá kommununi.

Annars sigur Jacob Vestergaard, at barnatalið í Kommununi hevur verið fallandi, men at nú er ein glotti í.

Í Sumba eru um 30 skúlabørn. Ein annar skúli er í kommununi, tað er skúlin á Leiti ímillum Lopra og Akrar. Og eisini har stendur so illa til við børnum, at um tvey ár verður bara eitt barn í tí skúlanum

Jacob Vestergaard sigur, at so slepst ikki undan einum kjaki um, antin skúlin á Leiti skal varðveitast, ella ikki.

Sjálvur vil hann treyðugt niðurleggja skúlan, tí hann ásannar, at verður hann niðurlagdur, verður hann aldrin latin upp aftur og hann heldur, at tá ið ein bygd missur skúlan, verður hon fátækari.

Men hinvegin mugu teir eisini viðgerða spurningin, um tað er fíggjarliga forsvarligt at hava ein skúla við bara einum næmingi. Tað eru tey, sum føra fram, at nú bergholið er komið ímillum Lopra og Sumba, er sambandið blivið so gott, at børnini í Lopra og á Økrum einsvæl kunnu ganga í skúla í Sumba, tí tað eru minni enn 10 minuttir at koyra.

# Træta um eina grótrúgvu endar nú í rættinum

**Sumbiar Kommuna heldur seg hava fingið játtilsi upp á eina stóra grótrúgvu, sum liggur í Lorpansdali, men Landsverkfrøðingurin hevur játtað vágbingum grótið til havnaútbygging**

EFTIRSPURNINGUR EFTIR GRÓTI
*Áki Bertholdsen*



*Í Lopra liggur ein stór grótrúgva, sum Sumbiar Kommuna heldur seg hava rætt til, men Landsverkfrøðingurin hevur lovað vágbingum grótið til at gera djúphavn og samferðsluhavn við*

**Sumbiar Kommuna:** Tað er stórur eftirspurningur eftir teirri stóru grótrúgvuni, sum liggur í Lopransdali – so stórur, at tað nú verður neyðugt hjá Føroya Rætti at gera av, hvør skal hava grótið.

Talan er um grótið, sum er sprongt úr tunlinum, ið gongur ímillum Lopra og Sumba.

Og tað er ikki hissini grótrúgva, talan er um, tí mett verður, at tað eru umleið 100.000 kubikk av gróti.

## Grótið til Vágs

Landsverkfrøðingurin hevur játtað Vágs kommunu grótið til at brúka til kommunalar útbyggingar, eitt nú til at fylla út framvið sjónum í sambandi við ætlaðu djúphavnina.

Men Sumbiar Kommuna tvíheldur um, at Landsverkfrøðingurin longu frammanundan hevði játtað Sumbiar kommunu rættin til grótið.

Fundir við Landsverkfrøðingin hava ikki ført til nakað úrslit og tí hevur Sumbiar Bygdaráð gjørt av at stevna Landsverkfrøðinginum

Í løtuni eru tað sakførarnir hjá báðum pørtum, sum skriva sínámillum sín og tí veit Jacob Vestergaard ikki akkurát, hvussu langt málið er komið.

Bygdaráðið í Sumba heldur, at Landsverkfrøðingurin kundi ikki lova grótið burtur tvær ferðir, men av tí at avtalað varð gjørd við Sumbiar Kommunu fyrst, er tað tann avtalan sum er galdandi og ikki avtalan, sum seinni er gjørd við Vágs Kommunu.

Jacob Vestergaard, hevur somuleiðis áður upplýst fyri blaðnum, at Landsverkfrøðingurin hevur harafturat altíð havt til siðvenju, at í sambandi við tunnilsgerðir eigur kommunan, sum arbeitt verður í, eisini grótið, sum er sprongt burtur.

Men í hesum føri er tað orð ímóti orði, tí Landsverkfrøðingurin sigur, at hann hevur ikki lovað sumbingum nakað.

Í rættinum fer Sumbiar bygdaráðið at krevja, at Landsverkfrøðingurin heldur avtaluna, hann hevur gjørt við kommununa.

## Fingu 20.000 kubikk

Annars hevur kommunan fingið skrivligt loyvi til at taka 20.000 kubikk av hesum sama gróti til at gera havnalagið størri.

Men kommunan hevur brúk fyri øllum grótinum, tí metingar vísa, at skal alt tað fyllast út, sum kommunan ætlar, verða tað brúk fyri 120.000 kubikkum av gróti, tí tað er rættiliga djúpt ov víðført.

Jacob Vestergaard sigur, at tað er brúk fyri at gera havnalagið størri, fyri at skapa møguleikar til at byggja virki, um áhugi er fyri tí.



# Bygdarhandilin á Húsum

**Dora Joensen hevur staðið í handlinum á Húsum í 12 ár. Maðurin, Bjarti Joensen, eigur handilin, men Dora er krambakvinnan á Húsum. Hóast tilboðini eru mong og góð í Klaksvík, so er altíð nógv at gera í handlinum**

HANDILSLÍV
*Solby A. Eliasen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Dora Joensen er úr Vági, men hevur búð á Húsum seinastu 15 árini, henni dámar væl at standa í handlinum á Húsum*

**Húsar:** – Eg skilji væl, at fólk fara til Klaksvíkar at keypa, tá tilboð eru. Eg meini, hví skulu tey keypa ein kaffipakka frá mær, sum tey fáa fyri einar 15 - 20 krónur í Klaksvík. Eg noyðist at keypa hann inn fyri 23 ella 24 krónur. Tað sigur seg sjálvt, at tað verður so nógv dýrari her, sigur Dora við einum smíli.

Hon sigur, at hon bíleggur breyð eina ferð um vikuna.

– Tað sum ikki verður selt tann dagin, frysti eg bara. Fólk her á oynni eru ikki kræsin, tað má eg siga. Tey keypa tað, sum er at fáa og tað ger tað hugaligt at hava handilin opnan.

Dora sigur, at tað er torført at bíleggja vøru, tí tað er ikki altíð so lætt at vita, hvat hon fer at hava brúk fyri. Men royndirnar upp gjøgnum árini gera sjálvandi sítt til, at tað er lættari nú enn fyrr. Hon heldur, at tað er serliga torført at bíleggja mjólk og breyð, tí til dømis mjólk skal bíleggjast hálvannan dag frammanundan og breyð dagin fyri.

Dora sigur, at hon vónar, at útoyggjafelagið fer at kunna hjálpa til, tá tað kemur til innkeyp hjá teimum smáu bygdarhandlunum í útjaðaranum.

– Tað hevði verið ynskiligt um útoyggjapoltikkurin hevði kunnað ført til, at teir smáu handlarnir kundu keypa inn fyri sama prís, sum teir stóru. Hóast vit ikki kunnu keypa inn í somu mongdum, sigur hon. Spurd, um hon ikki hevur roynt at spurt onkran av teimum størru handlunum í Klaksvík, um hon kann keypa inn saman við teimum, sigur Dora, at tað hevur hon ikki gjørt nakað við.

– Eg veit heldur ikki, um tað ber til.

## Onki bomm í skúlatíð

Meðan vit standa og práta, fer hurðin upp og tvær gentur koma inn. Tær ætla sær at keypa sær eitt hvørt gott. Onnur ger av, at keypa bomm fyri nakrar krónur. Dora tekur nakrar bommdósir og byrjar at fylla í bommposan. Stuttligt er at eygleiða tær, hvussu eyguni fylgja rørslunum hjá Doru, meðan hon koyrir eitt bomm fyri og annað eftir niður í tann lítla posan.

– Børnini sleppa ikki at keypa góðgæti í skúlatíðini. Tað gjørdi eg av, tí tað eru ikki øll, sum hava pengar við í skúla, og so er tað so keðiligt, tá onkur hevur. Tí góðgæti órógvar, og tey, sum ikki hava, tey fara bara at munga. Og tað haldi eg er synd, sigur Dora, meðan hon avgreiðir teimum báðum ungu damunum, sum eru komnar inn í handilin. Tær fara so vælnøgdar út aftur – helst at spæla eina løtu, nú tær hava fingið frí úr skúlanum og lummarnir eru fullir av góðgæti.

Dora sigur, at børnini hava ikki nógv at velja í, tá tað kemur til frítíðarítriv, men hon heldur kortini, at tey duga væl at fáa tíðina at ganga.

– Eg haldi ikki, at tey keða seg her í bygdini.

Í eini smábygd sum Húsar, eru ikki nógv javngomul børn, hóast tey eru nógv. So tá barnaføðingardagar eru, tá hoyrist tað um alla bygdina, um tey eru úti og spæla. Tí, sum Dora sigur, tá barnaføðingardagur er, tá fara øll børnini í bygdini í føðingardag. Nakað, sum er óhugsandi fyri eitt størri pláss, men á Húsum er tað ein sjálvfylgja.

Annars heldur Dora ikki, at fólk á Húsum nýta nógv hetta at ganga inn til hvønn annan.

– Tú fert ikki bara inn á gólvið hjá onkrum til kaffi, men sum sagt er nakað á vási, so fer nærum øll bygdin.

Prátið dettur inn á ferðaætlanina. Dora heldur líka sum Sára, lærarin í bygdini, at ferðaætlanin ikki er fyri børn, tí sum er, hava serliga tey eldru ongan møguleika at ferðast inn til Klaksvíkar at spæla fótbólt ella okkurt annað.

Um okkurt barn er, sum kundi hugsað sær at spælt bólt við KÍ, so letur tað seg einans gera við teimum lítlu deildunum. Tá komið verður upp í dreingjadeildina ella har á leið, eru venjingartíðirnar longu so seint út á seinnapartin ella tíðliga á kvøldi, at Barsskor hevur siglt fyri seinastu ferð tann dagin.

Men hinvegin fegnast kalsoyingar sjálvandi um, at fleiri túrar eru nú um vikuna enn tað hava verið.



*Tað er ikki lov at keypa bomm í skúlatíðini í handlinum á Húsum, men hesar eru lidnar í skúlanum henda dagin, so tað liggur væl fyri*

## Ósemjan merkist

Tá ein er í Kalsoynni, so kann ein ikki lata vera við at spyrja um trætuna um skúlarnar millum tær báðar norðastu bygdirnar á Kalsoynni, Mikladal og Trøllanes.

Tað er eitt mál, sum hevur verið sera nógv frammi í fjølmiðlunum. Dora sigur, at tað var næstan so, at hvønn dag í døgurðatímanum, so vóru yvirskriftirnar í Útvarpinum um kríggj aðrastaðni í heiminum og so skúlatrætan millum Mikladal og Trøllanes.

– Tað merkist væl í allari oynni, at har er ein álvarsligur kuril komin á tráðin, sigur Dora.

Hon heldur fram, at hetta málið hevur so avgjørt framt umfatandi skaðar á samanhaldið millum Mikladal og Trøllanes. Tvær bygdir, sum altíð hava havt so gott samanhald.

– Samanhaldið er burtur, tað er púra vist, sigur Dora og leggur aftur at, at tað er við at verða eitt tabu evni.

– Skúlamálið tosa vit næstan ikki um longur her á oynni, men avleiðingarnar eru har kortini. Til dømis høvdu vit ein bindiklubb í oynni, men hann er ikki til longur orsakað av trætuni har norðuri. Tað er so syndarligt, heldur Dora, men hon veit eisini, at tað eru fleiri enn hon, sum harmast støðuna millum Mikladal og Trøllanes.

– Tey eru uttan iva sjálvi nakað kedd av hesum.

Hetta er eitt mál, sum Dora tó aftrar seg við at siga ov nógv um, tí tað letur ikki til, at trætan er loyst, hóast børnini á Trøllanesi nú aftur eru í skúla í Mikladali.

Nú er tíð at steingja handilin til døgurða. Handilin er opin frá 10 - 12 og so aftur aftan á døgurða. Vit takka Doru fyri prátið og siga farvæl.

